

» Eg fari at tosa við stórum stavum

ÓRÍMILIGT

*Sum støðan er nú, hava vit onga ávirkan og fáa lítið at vita og tað er eitt sindur vanvirðisligt og órímiligt, heldur Annika Olsen, landsstýriskvinna*

# Snópisligt hjá Anniku Olsen

**LØGREGLA** Landsstýriskvinnan fer nú at biðja danska lógmálaráðharran broyta lógina so at føroyskir myndugleikar fáa ávirkan, tá ið broytingar verða gjørdar í løgregluni í Føroyum

Áki Bertholdsen

- Tað, sum gongur fyri seg, er ógvuliga flóvisligt, og tað ikki serliga stuttligt at standa her á løgtingins røðarapalli og siga, at mann onki veit.

Tað mátti Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, ásanna, tá ið nú ein dagin herfyri skuldi svara Kára P. Højgaard, sum spurdi um tað passar, at løgreglustøðin í Runavík skal niðurleggjast.

Landsstýriskvinnan ásannar, at tá ið tað snýr seg um viðurskiftini hjá løgregluni í Føroyum, er tað næstan hermetiskt lukkað land hjá føroyskum myndugleikum. Hóast hon hevur spurt fer eftir ferð, fær hon onki at vita, heldur ikki tá ið talan er um rættiliga víttfevnandi broytingar í løgregluni í Føroyum.

## Ikki nøktandi

Men hon leggur afturat, at støðan er ikki nøktandi og at hon nú fer at tosa við stórum stavum við leiðsluna fyri løgregluni í Føroyum.

- Hesum kann eg ikki liva við, staðfestir hon.

Í fyrstu syftu fer hon at biðja danska løgmálaráðharran, Lars Barfoed, broyta rættargangslógina so at føroyskir myndugleikar skulu bæði kunnast og hoyrast, tá ið týðandi broytingar verða gjørdar í løgregluni í Føroyum.

Í sama viðfangi fer hon at gera hann varugan við, hvussu ónøgd hon er við, at hon ikki fær neyðugar upplýsingar til at svara Løgtinginum upp á fyrispurningar.

- Tað er eitt sjálvsagt krav frá løgtinginum og tað vil eg hava møguleika til, sigur Annika Olsen.

Hon fer eisini at siga sína hjartans meining við fútan.

## Væntar vælvild

Sjálv væntar hon, at Lars Barfoed fer at skilja føroyska kravið, tí tað gjørdi hann í sambandi við bygnaðarbroytingarnar, sum vórðu framdar fyrr í ár.

- Tá varð tann broyting gjørd, at hereftir verður skulu tey, sum verða sett í leiðandi starv í løgregluni í Føroyum, hava kunnleika til føroysk samfelagsviðurskifti, mál og mentan.

Tað uppskotið hevur verið til hoyringar í Føroyum og nú fer Annika Olsen eisini at biðja um at fáa ta broyting í, at føroyskir myndugleikar skulu vera hoyrdir og kunnaðir, tá ið týðandi viðurskifti verða gjørd í løgregluni í Føroyum.

- Eitt er, at vit verða kunnað, sum frálíður, men verða týðandi avgerðir tiknar um umleggingar í løgregluni, sum at niðurleggja eina politistøð, er tað ikki meiri enn rímiligt, at føroyskir myndugleikar hava ávirkan á avgerðina.

- Sum støðan er nú, har vit onga ávirkan hava, er tað eitt sindur vanvirðislig, at vit onga ávirkan hava og vit fáa so lítið at vita.

*aki@sosialurin.fo*

---

# Fútin ikki heima

Sosialurin royndi at fáa eina viðmerking frá fútanum, men Karen Marie Olsen er uttanlands og verður ikki aftur fyrrenn í næstu viku

---

# Eysturoy má hava politistøð

Er tað verulia so, at ætlanin er at niðurleggja løgreglustøðina í Runavík, er tað ein ætlan, sum hóvar Anniku Olsen serstakliga illa.

Men, sum sagt í hinum greinunum her á síðuni, hevur ikki borið til hjá henni at fáa nakað at vita um tað.

- Men Eysturoy er so mikið stórt øki við yvir 10.000 fólkum, at tað er heilt náttúrligt, at løgreglustøð er í økinum.

- Ein sjónlig løgregla økir um tryggleikan og er fyribyrgjandi ístaðin fyri, at hon ofta ikki skal koma upp í leikin, fyrrenn skaðin er hendur.

Men hon leggur afturat, at tá ið bygnaðarbroytingarnar vóru fyri fyrr í ár, fingu bæði hon og Løgtingið vissu fyri, at tær seks politistøðirnar í Føroyum skulu varðveitast.

- So verður hálsað um nú, heldur tað lyfti ikki, staðfestir Annika Olsen.

---

# Løgreglan skal yvirtakast

- Løgreglan skal yvirtakast á føroyskar hendur.

Tað er eitt hjartamál hjá landsstýriskvinnuni í innlendismálum.

Annika Olsen heldur, at løgreglan og sýslumenn hava so stóran av avgerðandi leiklut í føroyska samfelagnum, at hon eigur at vera á føroyskum hondum, so at vit fáa skipað hana, soleiðis sum vit sjálvi halda vera best.

Í løtuni er løgreglan danskt málsøki og tað hevur mangan ført til tvídrátt og samanbrestir millum Føroyskar og danskar myndugleikar.

Eitt dømi um hetta eru bygnaðarbroytingarnar, sum vórðu framdar í vár og har føroyskir myndugleikar onga ávirkan fingu og sama skilið er, nú søgur eru farnar at ganga um, at løgreglustøðin í Runavík skal niðurleggjast.

Men landsstýriskvinnan heldur, at tað er stak óheppið, at tað krevst, at danir gera broytingar í rættargangslógini, hvørja ferð, føroysk og donsk áhugamál stoyta saman, soleiðis, sum greitt er frá í hinari greinini.

Kortini viðgongur hon, at hetta er ikki eitt mál, sum hendan samgongan er samd um.

Men hon staðfestir eisini, at kemur Fólkaflokkurin aftur í samgonguni, eigur tað verða ein partur av politiska grundarlagnum, at løgreglan verður yvirtikin á føroyskar hendur.